# Krav um endavending av Finansiel Stabilitet

## Stór ónøgd er millum semjuflokkarnar handan bankapakka eitt, og atfinningarnar eru um mátan, sum Finansiel Stabilitet verður stýrt

Leo Poulsen

Kravt verður, at búskapar- og arbeiðsráðharrin, Brian Mikkelsen, skal taka sær um reiggj.

Hjá Økonomisk Ugebrev hava tey fingið áheitanir frá eini røð av misnøgdum bankakundum, og hetta hevur víðari ført til ógvusligan kritikk frá politikarum sum halda, at Finansiel Stabilitet er farið alt ov harðliga fram í summum førum.

Sambært Colette Brix frá Dansk Folkeparti, næstforkvinnu í vinnunevndini, er hon til reiðar at taka um endan, og endavenda Finansiel Stabilitet, um Brian Mikkelsen einki ger.

Meiningin var ongantíð, at burðardyggar fyritøkur skuldu koma í vanda, sigur danski Javnaðarflokkurin, meðan pípan eisini hjá Det Radikale Venstre hevur fingið annað ljóð.

Vit kunnu ikki liva við illgrunanum um framferðarháttin, sum er umrøddur, sigur Morten Østergaard, framsøgumaður í vinnumálum hjá Det Radikale Venstre við Økonomisk Ugebrev.

Kortini vil Brian Mikkelsen ikki lova eina endavending av málinum, sjálvt um Økonomisk Ugebrev skilir á lagnum, at ráðið er í ferð við at kanna málið, skrivar Børsen.

# Vilja veita ungum læru- og starvstíð

## Bergtóra Høgnadóttir Joensen leggur vegna Tjóðveldi fram eitt uppskor, sum skal tryggja ungum lærupláss og møguleika fyri starvsvenjing innan almennu byggivinnuna

Leo Poulsen

Uppskot til samtyktar um at:

- Landsstýrið í øllum sáttmálum við virkir, sum skulu standa fyri bygginini av størri verkætlanum í Føroyum tryggjar og samráðist um, at fleiri lærupláss verða og møguleiki fyri starvsvenjing
- Landsstýrið tryggjar nógv fleiri lærupláss hjá almennum arbeiðsgevarum

Arbeiðsloysið í Føroyum økist alsamt. Tølini vísa, at tey sum onga útbúgving hava, oftast eru tey, sum gerast arbeiðsleys. Heili 80 – 90 %. Hugsandi er, at prosentparturin er enn hægri, tá tey uppsøgdu í Fiskavirking verða tald við.

Vit vita eisini, at fleiri og fleiri størv krevja, at fólk hava eina útbúgving. Starvsmøguleikar, løn og setanartreytir eru oftast fleiri og betri hjá teimum, sum hava eina útbúgving.

Ítøkiligar ætlanir eru um fleiri størri verkætlanir í byggivinnuni:

- Skúladepilin í Marknagili
- nýggjur psykiatriskur Depil
- røktarheim
- bústaðir til sálarsjúk
- Ábøtur á skúladeplinum í Hovi.

Aftur og aftur er borið fram, at íløgurnar sum tíðirnar eru skulu vera arbeiðsskapandi. Tíverri er veruleikin, at vit ikki veruliga kunnu vísa á, at arbeiðsskapandi virksemið til føroyskar hendur í nóg stóran mun fer fram. Arbeiðsloysið veksur og nógv virki sigla í sera tungum sjógvi.

At arbeiðið skuldi verið bæði hjá lærlingum og praktikantum í ætlaðu verkætlanunum tykist eingin ivi at vera um. Talan er um sera stórar verkætlanir í fleiri førum sum verða í gerð í fleiri ár og lærlingar hava eitt lærupláss alla lærutíðina. Sum dømi kann nevnast, at tá fyrsta byggistig í Berjabrekku var í gerð starvaðust tveysiffrað tal á timburmonnum har øll árini.

Vit vita, at avbera nógvir arbeiðsgevarar kýta seg og taka fleiri lærlingar. Eisini er greitt, at privatir arbeiðsgevarar eru nógv »óførari« enn almennir, um vit hyggja at hagtølunum. Men við høgum arbeiðsloysi serliga millum tey, sum onga útbúgving hava, er neyðugt at samráðast um enn fleiri lærupláss. Talan er jú um almennar verkætlanir sum landið rindar.

Møguleikin eigur at vera hjá fleiri enn í dag fyri læruplássi. Talan kundi verið um eittnú elektrikarar, timburmenn, múrarar, málarar. Kanska møguleiki innan skrivstovu ella matgerð eisini verður ein møguleiki á skúladeplinum ella psykiatriskadeplinum – annaðhvørt sum lærupláss ella praktikkpláss.

Hagtøl hava víst, at almennir arbeiðsgevarar hava fá lærupláss. Tykist løgi, tí tað eigur vera góð siðvejna og sjálvsagt, at tað almenna tekur sosiala ábyrgd til tess at íbúgvarnir hava fjølbroyttar útbúgvingarmøguleikar, ikki minst, tá so nógv uttan útbúgving teljast millum tey, sum eru arbeiðsleys. Hugsa vit um kostnaðin er talan um sera bíliga arbeiðsmegi, tá vit tosa um lærlingar.

Lærupláss er eitt. Men starvsvenjing/ praktikkpláss eru eisini neyðug. Lutvís sum praktikkpláss, har fólk sleppa at royna seg í einum nýggjum fakøki, men eisini um fólk hava tørv á at finna út av, hvør útbúgving kundi verið ein møguleiki ella fyri at bøta um og tryggja og varðveita arbeiðssamleikan hjá tí, sum er arbeiðsleysur.

Eisini átti ríkur møguleiki at verið fyri ymiskum uppgávum í mun til ung í arbeiði.

Ávísar forðingar kunnu ivaleyst vera í mun til hetta uppskot. Umráðandi er tí, at tosa við eittnú partarnar á arbeiðsmarknaðinum og ikki minst teknisku skúlarnar um, hvussu uppskotið kann gerast veruleiki.

Vit mugu kýta okkum og av álvara taka tøk, so arbeiðsloysið minkar. Her og nú.

Arbeiðsloysið verður væntandi 8 – 9 % . At vera arbeiðsleysur er oyðileggjandi fyri bæði samleika og trivnaðin sum heild. Tá fólk gerast arbeiðsleys er sera umráðandi, at tey kenna á sær, at ein vón og møguleikar eru fyri framman. Hetta uppskotið kundi verið eitt fet á vegnum – um vit velja at síggja loysnir heldur enn forðingar.



# Eyðun 25 ára starvsdag

## Eyðun Jensen hevði móttøku seinnapartin í gjár har hann hátíðarhelt 25 ára starvsdag sín hjá Tórshavnar kommunu sum leiðari av Sosialu deild

Leo Poulsen

Tað var 1. november 1985, at Eyðun Jensen byrjaði sum leiðari av Sosialu deild hjá Tórshavnar kommunu. Og í gjár var so móttøka fyri honum og 25 ára degnum.

Halla Samuelsen, forkvinna í Sosialu nevnd hjá Tórshavnar kommunu, og Heðin Mortensen, borgarstjóri, hildu røður.

Nógv er sjálvandi broytt hesi 25 árini í Sosialu deild, sum nú heldur til í hølunum, sum Advokatfelagið plagdi at húsast í á horninum av Jóannes Patursonargøtu, har ljóskurvarnar eru.

# Føroyskur skipari í ódnarveðri

## Føroyingurin, Idar Petersen, er skipari umborð á arktiska ferðamannaskipinum, Clelia II, sum um vikuskiftið var í ógvusligum ódnarveðri út fyri Argentina

Idar Petersen, sum er ættaður úr Norðoyggjum, segði við fjølmiðlarnar í argentinska býnum Ushuaia, at hann ongantíð hevur verið í so ringum veðri áður.

Hann segði, at fleiri rútar vórðu brotnir inn á brúnni og oyðilegði eitt nú samskiftispultin.

- Á AIS-skipanini sóu vit, at eitt skip frá National Geographics var 23 fjórðingar frá okkum, og tí boðaðu vit frá avmarkaðari manøvru, og tað fekk so skipið at nærkast okkum somikið, at vit fingu fatur á teimum umvegis VHF'in, segði Idar Petersen.

Tað eydnaðist at fáa



*Clelia II í heldur betri veðri enn teir vóru í um vikuskiftið*

tamarhald á støðuni og sigla skipið í havn í Ushuaia.

Idar Petersen hevur verið í lótum áður, fyrstu ferð í juni 2007, tá hann var skipari umborð á Ocean Nova, og togaði eitt annað ferðamannaskip, Quest, av einum skeri í Diskovíkini.

Eisini í februar 2009, tá Ocean Nova við øðrum skipara rendi á eitt sker við Antarktis, kom Idar Petersen til hjálpar umborð á Clipper Adventurer, og tók ferðafólkini av Ocean Nova, veit ABC News at siga.

Umborð á Clelia II vóru 88 ferðafólk og manningin taldi 77. Sambært stjóranum í felagnum, sum eigur Clelia II, fáa øll ferðafólkini kostnaðin av ferðini endurgoldnan.